## Eni valdi Hammerfest

Í seinastuni hevur ein ávísur spenningur verið um, hvørja norðurnorska havn oljufelagið Eni Norge fór at velja sær sum støð fyri virkseminum á Goliat-leiðini í Barentshavinum, har Eni Norge er operatørur. Seinasta fríggjadag boðaði felagið so frá, at tað hevur valt at brúka Hammerfest sum miðstøð. Eni Norge er sum nevnt operatørur á Goliat-leiðini og eigur 65 prosent av rættindunum. Statoil/Hydro eigur 20 prosent og NOIL Energy 15 prosent.



*Hammerfest verður miðstøð fyri Goliat-oljuleiðina (Mynd: Hammerfest Turistkontor)*

# Jarðfeingi sær 2008 sum




*Petur Joensen, stjóri í Jarðfeingi: -Vit royna at fáa gott samstarv við brestkar oljumyndugleikar*

**Williamboringin á landgrunninum er mest spennandi málið í løtuni fyri føroysku oljufyrisitingina. Men 3. útbjóðing umframt gongdin í bretskum øki hevur eisini høga raðfesting hjá Jarðfeingi**

OLJUÁRIÐ 2008
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

2008 er fyrsta heila árið hjá nýggja stjóranum í Jarðfeingi, Petur Joensen. Herfyri fór Sigurð í Jákupsstovu í farlovyi og Petur Joensen tók við. Hóast lítið er hent á oljuøkinum í eina tíð, so heldur nýggi stjórin á føroysku oljufyrisitingi, at vit ganga eini spennandi tíð á móti.

### 3. úbjóðing

– Størsta málið hjá okkum í nýggja árinum er útbjóðingin á landgrunninum, sum vónandi verður tikin fram aftur so skjótt tingið kemur saman sigur stjórin á Jarðfeingi, Petur Joensen við Portalin. Men boringin hjá BP á Williamleiðini, sum fer fram í løtuni, er eisini eitt av teimum mest spennandi málunum, sum upptekur fólkini á Jarðfeingi.

– Vit fáa allar upplýsingar frá BP, men her er talan um ein brunn, har eingir upplýsingar skulu fara út til almenningin, fyrr enn fyristøðufelagið gevur grønt ljós sigur Petur Joensen.

### Aðrir brunnar

Tá vit spyrja oljuhøvdingan, hvat annars er á skránni á oljuøkinum í næstum sigur hann, at boringin hjá ENI á Anne Marie leiðini er so eisini eitt av teimum málum, sum Jarðfeingi sær fram til. Hon er sett til at verða borað í ár ella í 2009. Talan er um eitt níggju ára loyvi, sum gongur út í august næsta ár. Sum skilst fer ENI helst at bora í komandi ári. Umfraмt ENI er eisini Faroe Petroleum partur av loyvinum, og herfyri keypti japanska felagið Cieco seg inn í hetta loyvið.

Eitt annað spennandi mál, sum stendur á skránni í føroysku oljutilgongdini, er boring á Súluleiðini, sum er eitt loyvi, ið oljufeløgini Chevron, Statoil, Dong og OMV fingu tillutað í 2.




*Nógv leitivirksemi verður komandi árini, bæði í føroyskum og bretskum øki*